## Kitsch í Føroyahúsinum

Føroyahúsið í Keypmannahavn hevur opið fyri seinastu ferð áðrenn summarfrítíðina fríggjakvøldið 20. juni. Í hesum sambandi verður skipað fyri einum tiltaki, sum verður kallað, Kitsch Kvøld. Talan gerst um eitt brak av einum kvøldi, sambærð fyrireikarurnar. Dugnaligi plátuvendarin, Magni Berg, er boðsendur úr Århus, og hann skal við sínum stóra úrvali av plátum av 80'ara tónleiki skipa fyri live-aid konsert á stórskýggja. Summarfestivalurin stuðlar tiltakinum við trimum atgongumerkjum, sum vera burturlutað tilvildarliga hesar klokkutíðir: Kokkan 22, 23 og 24. Lagrið í Føroyahúsinum skal endurnýggjast, soleiðis at prísirnir verða í botni, verður sagt.



# Minsti toskastovnur í hundrað ár

**- Tað er møguligt, at vit tykjast nakað svartskygdir, men tað er ein sannroynd, at toskastovnurin ongantíð hevur verið minni enn nú, heilt frá tí vit byrjaðu at meta um stovnin í 1960, sigur Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni**

STOVNSRØKT
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

- Alt tað, vit vita, hevur toskastovnurin ikki verið verri fyri tey seinastu hundrað árini, enn nú.

So bersøgin er Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni. Hann fer enntá so langt sum at siga, at hann ikki veit, um stovnurin yvirhøvur er førur fyri at endurnýggja seg.

- Tí er neyðugt at taka støðuna í fullum álvara, og tí er tilmælið frá okkum soleiðis sum tað er, sigur Hjalti í Jákupsstovu við Rás2.

Og hetta er enntá ikki so harligt eitt tilmæli, sum tað, ICES kemur við, vísir stjórin á Fiskirannsóknarstovuni á.

Talan er kortini ikki um eindømi um harðlig tilmæli frá Fiskirannsóknarstovuni.

- Vit høvdu nøkur líknandi tilmælir miðskeiðis í 90-unum, og tá mælti ICES eisini til at steðga øllum fiskiskapi eftir toski, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

Hann heldur, at tað verður trupult heilt at steðga øllum fiskiskapi eftir toski, og tað fer undir øllum umstøðum at koma nakað av hjáveiðu upp á land, tá roynt verður eftir øðrum fiskasløgum. Og búskaparliga fer tað eisini at merkjast.

- Men hava vit ongan tosk í framtíðini, er betur at binda um heilan fingur og steðga við toskaveiðini, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

Flestu minnast, hvussu bankatoskurin knappliga hvarv undir New Foundlandi, og tað er ein støða, sum vit eiga at halda okkum langt frá, heldur Hjalti í Jákupsstovu.

- Tað, sum hendur í vistskipanini, tá vit troyta toskin so hart, sum vit hava gjørt, tað vita vit ikki. Tað er vónleyst at spáa um, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

### Politikarar mugu reagera

Stjórin á Fiskirannsóknarstovuni sigur, at kanadiumenn fingu krabbar og rækjur í staðin, og teir forvinna líka nógv upp á tað.

- Men alt samfelagið mátti leggja um, og øll fiskifør broytast, og tað var ein rættiliga buldraslig prosess. Sjálvt um tað ikki hevur verið loyvt at fiska tosk síðani 1992, er stovnurin enn ikki komin fyri seg, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

Hann sigur víðari, at tað eru politikararnir, sum mugu taka sær av tilmælinum.

- Tað eru teir, sum vara av felagsognini, og tað eru teir, sum kunnu staðga fiskiskapinum, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

Løgtingið er sum kunnugt í summarfrí og kemur ikki saman aftur fyrr enn á Ólavsøku. Men tað er eingin trupulleiki.

- Okkara tilmæli er ætlað politikarunum at taka støðu til, tá teir koma saman á Ólavsøku. Tilmælið er fyri komandi fiskiár, sum byrjar 1. september, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

Stjórin á Fiskirannsóknarstovuni vónar sostatt, at politikararnir nýta tíðina til Ólavsøku at hugsa um støðuna, sum toskastovnurin er komin í.

Lesið annars um sjálvt tilmælið hjá Fiskirannsóknarstovuni á síðunum 26 og 27 í blaðnum í dag.



*Støðan hjá toskastovninum hevur ongantíð verið verri tað menn vita um, sigur Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni*

# Manson-mordari biður um náði

**Lívstíðarfangin Susan Atkins, sum drap eftir boðum frá Charles Manson, er nú deyðasjúk av krabbameini í heilanum, og vónar at verða leyslatin**

LÍVSTÍÐARFANGI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Susan Atkins var ein ung kvinna, tá hon fyri smáum 40 árum síðani var við til at pína og myrða sjónleikarkvinnuna Sharon Tate, sum var við barn. Hetta hendi eftir boðum frá hippi-guruini Charles Manson.



*Susan Atkins var bert 18 ára gomul, tá hon fall í klórnar á Charles Manson. Nú er hon 60 og deyðasjúk av krabbameini í heilanum*

Tá Susan Atkins, sum tá hoyrdi til harkaliðið hjá Manson, kom fyri í rættinum, ákærd fyri ræðuligu drápini, sang og fnisaði hon bara.

Hatta svínið hevði uppiborið at doy. Eg angri einki, rópti Susan Atkins í rættinum, har tað eisini kom fram, at hon drakk blóð frá Sharon Tate.

Nú hava læknar greitt 60 ára gamla lívstíðarfanganum frá, at hon hevur krabbamein í heilanum, sum ikki kiann lekjast, og at hon bert hevur hálvt ár eftir at liva í.

Susan Atkins hevur tí søkt um royndarleyslating, so hon kann doyggja sum fræls kvinna.

Tú skal meta ein persón upp á atferðina hjá viðkomandi, og mín atferð er broytt munandi seinastu 30 árini. Eg eri ikki longur sami persónur í dag, sum tá eg fyrst kom í fongsul, hevur Susan Arkins sagt við ABC-støðina.

Hon hevur áður sagt, at hon varð heilsvaskað og ávirkað av hørðum stoffum, tá hon í august 1969 tók lut í blóðbaðnum.

Hon hevur sitið í kvinnufongslinum í Corona í Kalifornia í 37 ár. Hetta er longri tíð enn nøkur onnur kvinna í statinum, og 11 ferðir er hon noktað royndarleyslating, skrivar ekstrabladet.dk